# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit hava áhuga í kríggi við Suður-Ossetia. Tí hevur herurin fingið boð um ikki at svara álopum*

*Mikhail Saakasvilij*

# Islamistar hótta OL við bumbum

**Ein felagsskapur, ið nevnir seg Islamski flokkurin í Turkestan, hóttir við at leggja bumbur í bussar undir teimum olympisku summarleikunumí Kina**



*Maðurin á sjónbandinum hóttir við at leggja bumbur í bussar undir olympisku leikunum í Beijing*
*Mynd: Polfoto*

TIP, sum felagsskapurin eisini nevnir seg, vil vera við, at tað er hann, sum hevur skipað fyri fleiri bumbuatsóknum í Kina í seinastuni. Eitt nú hevur TIP átikið sær ábyrgdina av bumbuspreingingum í býunum Shanghai og Kunming, men teir kinesisku myndugleikarnir avsanna, at TIP hevði nakað við tær spreingingarnar at gera.

Umframt sjálva bumbuhóttanina hevur TIP sambært amerikonskum keldum mælt øllum muslimum frá at ferðast í bussi, toki ella flogfari saman við kinesarum ella at vera í sama húsi sum kinesarar.

Á einari sjónbandsupptøku, sum altjóða tíðindastovurnar hava fingið atgongd til, vil TIP vera við, at kinesisku myndugleikarnir fara illa við muslimum í Eystur-Turkestan, sum er tað muslimska navnið á kinesiska landspartinum Xinjang, har meirilutin av fólkinum eru muslimar.

TIP hevur fyrr lýst heilagt kríggj ímóti teimum kinesisku myndugleikunum, og sambært Reuters brúkar felagsskapurin búmerkið hjá teimum olympisku leikunum í Beijing á sjónbandinum.

Maðurin, sum lesur boðskapin, hevur eina maskinbyrsu av slagnum AK-47, og andlitið er fjalt. Aftan fyri mannin standa orðini "Tað er eingin annar Guð enn Allah, og Muhammed er boðberi hansara".

Vesturlendsk tíðindafólk, sum eru komin til Beijing í sambandi við olympisku leikirnar, siga, at trygdartiltøkini eru sera strong bæði á tí olympiska økinum og í sjálvum býnum.

# Georgia fyrireikar seg til kríggj

**Georgia riggar til at fara í kríggj við Suður-Ossetia, sigur russiska uttanríkisráðið**

Georgiskir embætismenn hava sagt, at seks fólk vórðu særd, tá uppreistrarmenn í Suður-Osseta skutu inn um markið gjáranáttina. Sagt verður, at georgiski stjórnarherurin valdi at svara skotunum, og at fleiri skotríð vóru at hoyra langt út á náttyina.

Síðani seinast í nítiárunum hevur ein loysingarstjórn sitið við valdið í Suður-Ossetia, men enn hevur stjórnin ikki fingið altjóða viðurkenning.

Russland hevur eggjað georgisku myndugleikunum og uppreistrarmonnunum í Suður-ossetia til at binda frið, og í gjárkvøldið boðaði georgiska stjórnin frá, at semja var fingin við uppreistrarmenninar.

Aðrar keldur siga seg kortini ivast í, hvussu álítandi semjan er.



*Georgiski forsetin, Mikhail Saakashvili*
*Mynd: Polfoto*

STUTT SAGT

## Naknir týskarar ørkymla

Póllendingar, sum búgva har norðuri við markið millum Pólland og Týskland, eru ikki serliga fegnir um, at týskarar svimja ella ganga naknir á svimjistrondini Usedom við Eystrasalt. Í seinastuni hava fólk í fleiri sokallaðum nudistafeløgum brúkt Usedom-strondina sum tilhaldsstað, og tað er fallið teimum katólsku póllendingunum fyri bróstið, skrivar týska blaðið Bild.

Ein týskari, sum blaðið hevur tosað við, sigur, at póllendingar hava einki at ilskast inn á, tí eitt nakið fólk er ikki stórt ørvísið at síggja enn ein apa. Men ein polsk kvinna, sum Bild eisini hevur tosað við, sigur, at týska framferðin er ósømilig, og at ein póllendingur hevði ikki funnið uppá at gingið nakin á strondini.

Myndugleikarnir í Týsklandi og Póllandi hava ikki gjørt so nógv burtur úr stríðnum um teir naknu týskararnar, men teir lokalu myndugleikarnir báðumegin markið hava kortini gjørt av at seta upp skelti, sum siga, hvar ein kann sóla sær ella svimja nakin, og hvar ein skal vera í klæðum.



*Usedom-strondin við Eystrasalt*
*Mynd: AFP*

## Av sjónum í klivan

Ein norðmaður hugsaði seg ikki nóg væl um nú í vikuni, tá hann í stuttleikabáti sínum kendi seg noyddan at ringja til løgregluna. Tá løgreglan svaraði, greiddi maðurin frá, at hann var í bátinum, og at hann ætlaði sær til Tønsberg, men at hann visti ikki, hvar hann var staddur.

Løgreglan sendi bjargingarbátin Simrad Færder at leita eftir báti og manni, og tað tók ikki langa tíð at finna bát og mann. Tá maðurin so kom í land, bleiv hann avhordur, og løgreglan valdi at taka blóðroynd av honum. Tað vísti seg, at hann hevði ov nógv alkohol í blóðinum, so tann óhepni maðurin varð settur beinleiðis í varðhald, skrivar blaðið VG.